# Magnus nýggjur formaður í Lærarafelagnum

**Á aðalfundi í Føroya Lærarafelag leygardagin varð Magnus Tausen valdur til nýggjan formann við stórum meiriluta. Nýggi formaðurin ætlar at skapa eitt tættari samband millum felagið og limirnar**

FORMANSSKIFTI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Okkurt um 200 limir vóru møttir á aðalfundi lærarafelagsins leygardagin. Eitt av málunum, ið skuldi avgreiðast á árliga aðalfundinum, var, hvør ið skuldi verða formaður í felagnum næstu tvey árini. Vanliga plaga tað ikki at verða fleiri valevni, men hesaferð vóru valevnini ikki færri enn trý í tali.

### Magnus vann stórt

Teir tríggir lærararnir, ið høvdu bjóðað seg fram til formanssessin, vóru sitandi formaður Johannes Eli Iversen, næstformaðurin Magnus Tausen og so Jón Ingi Eidesgaard, lærari í Oyndarfirði.

Tað gjørdist sitandi næstformaðurin, Magnus Tausen, ið vann stríðið um formanssessin, og tað gjørdi hann við stórum meiriluta.



*Magnus Tausen varð leygardagin valdur til nýggjan formann í Føroya Lærarafelag við stórum meiriluta*

Mynd: Jens Kr. Vang

Magnus fekk ikki færri enn 107 atkvøður, meðan Jón Ingi fekk 37 atkvøður og verandi formaður, Johannes Eli Iversen fekk 34 atkvøður.

Nývaldi formaðurin er lærari í Kommunuskúlanum í Havn, men av tí at formansstarvið í Føroya Lærarafelag er eitt fulltíðarstarv, fer Magnus í komandi viku í farloyvi úr lærarastarvi sínum. Tó sigur hann, at hann hevur onkran flokk, ið hann skal føra upp til próvtøku í summar, og tí fer hann framvegis at verða knýttur at kommunuskúlanum næstu mánaðirnar, so at næmingarnir, ið skulu til próvtøku, ikki verða sleptir upp á fjall.

### Styttri millum limir og nevnd

Magnus Tausen sigur, at eitt tað týdningarmiklasta málið, ið hann ætlar sær at fáa loyst, er álitisfólkaskipanin.

– Eg havi ført fram sum eitt slag av einum kritikkpunkti, at felagið ikki er nóg nógv frammi millum limirnar. Um vit høvdu dugað at brúkt álitisfólkaskipanina betur, høvdu vit havt eitt nógv meiri dynamiskt felag, sigur Magnus Tausen.

Nývaldi formaðurin sigur, at í næstum verður farið undir at útbúgva álitisfólkini, soleiðis at tey eru nóg væl skúlað til, at tey kunnu tryggja, at alt fer fram eftir bókini úti á skúlunum.

– Eg haldi eisini, at tað hevur verið ov langt millum nevndina í Føroya Lærarafelag og limir felagsins, og at ein gagnnýtsla av álitisfólkaskipanini kundi bøtt um hetta. Tað kemur ov lítið fram, og tað er alneyðugt, at vit fáa eitt meiri opið felag. Sjálvsagt eru tað eisini nógv mál, sum vit arbeiða við, ið ikki skal út millum limirnar, men vit eiga í væl størri mun at kunna limirnar um virksemi felagsins, sigur Magnus Tausen.

Sáttmálin hjá Føroya Lærarafelag við Fíggjarmálastýrið gongur út í heyst, og tí verður farið undir at samráðast um nýggjan sáttmála í næstum. Í hesum sambandi er nevndin í Føroya Lærarafelag farið undir at fyrireika seg til hesar samráðingar, ið ivaleyst fara við nógvari orku, greiðir Magnus Tausen frá.

## Listfrøðingurin sagt seg úr starvi

**Inger Smærup Sørensen, listfrøðingur á Listasavni Føroya, hevur sagt seg úr starvi til 30 apríl**

LISTASTRÍÐIÐ
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Fríggjadagin boðaði stýrið fyri Listasavn Føroya frá, at listfrøðingurin á savninum, Inger Smærup Sørensen, hevur sagt seg úr starvi frá 30. apríl at rokna. Inger Smærup Sørensen hevur verið sjúkrameldað í drúgva tíð, og hon verður heldur ikki at síggja aftur á savninum, áðrenn hon fer úr starvi sínum.

### Var royndarsett

Sjálv vil Inger Smærup Sørensen ikki siga nakað um, hví hon hevur sagt seg úr starvi, og tað vil formaðurin í stýrinum fyri Listasavn Føroya, Jógvan Páll Lassen, heldur ikki.

– Inger Smærup Sørensen var sett í fyribils fimm ár, men hon var royndarsett tað fyrsta árið, og tað vil siga, at hon var royndarsett til 1. august í ár. Hon hevur sjálv sagt upp, og vit hava síðani samráðst okkum til eina avtalu, sigur Jógvan Páll Lassen.

Formaðurin í stýrinum fyri listasavni sigur, at stýrið umhugsar nú, hvussu man skal leggja virksemi hjá Listasavninum til rættis, og fleiri møguleikar verða havdir á lofti.

– Vit hava tó ikki funnið av nøkrum enn. Talan er jú eisini um eina heilt nýggja nevnd, ið nú situr fyri Listasavnið, og vit skulu líka fóta okkum, áðrenn vit koma við nakrari niðurstøðu, sigur Jógvan Páll Lassen.

Hann sigur tó, at tey ætla at gera hetta sum skjótast, og so verður helst skipað fyri einum tíðindafundi, har stýrið alment leggur fram, hvussu tað ætlar at skipa virksemi á tí nógv umstrídda Listasavni Føroya.

## Misti ytsta liðin á trimum fingrum

Ein arbeiðsvanlukka var í einum av stóru timburhandlunum í Havn leygardagin. Ein maður, sum arbeiddi við einari stórari sagimaskinu, fekk tríggjar fingrar í klemmu í maskinuni, og hann misti ytsta liðin á teimum trimum fingrunum.

Vakthavandi á politistøðini í Havn upplýsir, at málið er farið til Arbeiðseftirlitið, sum kannar umstøðurnar kring tilburðin leygardagin.

**tn**

## Smádreingir lupu á javnaldra

Bert eitt harðskapsmál hevur verið í høvuðsstaðnum um vikuskiftið. Náttina til sunnudagin lupu nakrir dreingir á ein javnaldra í miðbýnum í Havn. Álopni drongurin fekk nakrar smávegis snuddir í andlitið og varð sendur á skaðastovuna.

Av tí at bæði álopsmenninir og tann álopni eru yngri enn 15 ár, er málið beint víðari til barnaverndina, greiðir vakthavandi á politistøðini í Havn frá.

**tn**

## Stuldur í eysturbýnum

Sunnukvøldið varð boðað frá stuldri í eysturbýnum. Brotið var inn í ein persónbil uttan fyri eini hús, og tjóvarnir høvdu ruddað bilin fyri virðislutir. Síðani vóru teir farnir inn í garðin, har teir høvdu stolið ymsar lutir av eini motocross, ið stóð í garðinum.

Hetta er aðru ferð innan stutta tíð, at stuldur verður framdur móti húskinum, ið eiga bilin og motocrossina, og tað kundi bent á, at tjóvarnir kenna tey, ið teir stjala frá.

**tn**

## Fekk hondina í klemmu

Umborð á Brimli, sum um vikuskiftið lá á Fuglafirði, hendi ein arbeiðsvanlukka seinnapartin leygardagin. Menn vóru í ferð við at spola ein weir av einum spæli, tá ið tað bráddliga strammaði í, og hondin hjá einum manni lá í klemmu. Sambært vakthavandi á politistøðini í Runavík fekk maðurin ikki stóran skaða í hondina.

Skipaeftirlitið fekk fráboðan um málið og hevur longu gjørt sínar kanningar. Niðurstøðan hjá teimum er tann, at alt var í lagi umborð á Brimli, og at talan var um eitt hendiligt óhapp.

Av politistøðini í Runavík frætta vit annars, at talan hevur verið um eitt stak friðarligt vikuskifti í aðrar mátar.

**tn**

## Koyrdi ávirkaður og uttan koyrikort

Løgreglan í Havn tók leygarmorgunin ein mann fyri at koyra ávirkaður. Rúsdrekkakoyringin fór fram í Norðstreymoy, og tað vísti seg eisini, at umfram at verða ávirkaður, so koyrdi maðurin eisini uttan at hava nakað koyrikort.

**tn**

## Leigari og útleigari ósamdir

Leygarkvøldið bleiv løgreglan í Havn boðsend í sambandi við húsaófrið. Tað vísti seg, at talan var um tveir partar, har annar var útleigari og hin var leigari undir somu lon. Tað eydnaðist tó løgregluni at tosa partarnar til sættis á staðnum, og meiri verður ikki gjørt við málið, upplýsir vakthavandi.

**tn**

## Stak friðarligt í Klaksvík

Løgreglan í Klaksvík hevur ikki havt nógv at gjørt um vikuskiftið. Sýslumaðurin í Klaksvík, Karl Johansen, sigur, at talan hevur verið um eitt serstakliga friðarligt vikuskifti, har løgreglan í Norðoyggjum ongar tilburðir av rúsdrekkakoyring, stuldri, harðskapi, herverk ella øðrum hevur havt.

**tn**